gult cyan magenta svart

Oljutingi› hevur skipa› seg

Ingvør Nolsøe, forkvinna í Oljutinginum

Eftir stovnandi a›alfund tann 10. mai, kom n‡valda nevndin saman fyri at skipa seg og fyri at stinga út í korti›, hvørji tiltøk felagi› eigur at taka stig til – einsamalt ella saman vi› ø›rum.

Nevndin hevur skipa› seg solei›is:
Ingvør Nolsøe, forkvinna
Jan Mortensen, næstforma›ur
Geir Atle Rishovd, kassameistari
Martin V. Heinesen, skrivari
Alex Buvik

Longu á fyrsta fundinum, var› skjøtil settur á at fyrireika tiltøk fyri limirnar. Ætlanin er at hava ikki færri enn tvey tiltøk til heystar.

Enn eru tiltøkini bert á fyrireikingarstigi, men ætlanin er at stu›la eftir førimuni einari oljurá›stevnu, i› líkist henni, sum Euroforum skipa›i fyri heysti› '99. Dentur ver›ur lagdur á, at føroysku sjónarmi›ini skulu koma meira til sjóndar í oljuhøpi.

Um ta› mundi oljurá›stevnan ver›ur, vita vit helst hvørji oljufeløg hava fingi› leitingarloyvi. Og tí metir nevndin ta› vera rættliga vi›komandi, at fáa gli› á eitt ítøkiligt kjak um hvønn leiklut føroyskar fyritøkur skulu hava. Ætlanin er at bæ›i operatørar og veitarar skulu taka lut á rá›stevnuni.

Eitt anna› tiltak, i› væntandi ver›ur á skránni, er at bjó›a einum av operatørunum, i› hevur fingi› tilluta› leitingarloyvi, at grei›a frá arbei›sætlanunum vi› serligum atliti til leiklutin hjá føroyskum veitarum. Endamáli› er, at fáa eina ítøkiliga mynd av, um ætlanir standa mát vi› veruleikan. Somulei›is er ætlanin at skipa fyri temadøgum vi› m.a. føroyskum veitarum av tænastum og vørum.

Nevndin í Oljutinginum setti sær tí fyri, at fara undir at fyrireika tiltøkini beinan vegin og at kunna limirnar so hvørt, sum arbei›i› kemur undir land.

Nevndin hevur eisini valt eitt búmerki til Oljuting. Búmerki› ímyndar ein tingpall úr gróti. Føroyingar hava drúgva si›venju at seta ting og gróti› er ímyndin av fláunum, har tilfeingi› liggur.

Vinarliga
Nevndin

OLJUTINGIÐ
Petroleum Association of the Faroe Islands

Ein sera gó› byrjan

Fólkatónleikarastevnan 2000

Á myndini síggjast Kári Sverrisson og Høgni Klakkstein úr Enekk

OR› OG MYNDIR:
JÓHAN JACOBSEN

Mánakvøldi› vór›u fyrstu tónarnir frá Fólkatónleikarastevnuni spældir; eitt sera væl eydna› konserttiltak í Losjuni í Gøtu. Hetta kvøldi› var› samskipa› vi› tónleikafelagnum Grót, sum hevur havt fleiri tiltøk í sí›stuni.

Losjan í Gøtu er ikki, sum tær heilt stóru ítróttarhøllirnar, har dansur og konsertir ofta ver›a hildnar, heilt mótsatt. Júst hetta gevur tónleikinum gó›ar umstø›ur, ljó›i› er nær og ein fær meir burturúr. Húsi› var fultsett, yvir hundra› fólk, ta› bleiv kanska heldur trongligt. Men tó ikki minni hugnaligt, kaffi og køkur vóru at fáa.

Skráin hetta kvøldi› var vi› heili fimm nøvnum; Shalder Geo, Økusól, Hanus G. Johansen, Enekk og trummuleikarin Malick Jagne úr Gambia.

Shalder Geo leg›i fyri. Bólkurin er manna›ur vi› He›in Z. Davidsen, el-guitar, Høgna Klakkstein, trummur, Mikael, kontrabass og Kristian Blak á klaver. Her hoyrdi ein spennandi, lættar og spælisligar tónar, frá dugnaligum tónleikarum. Frá fegnum spælimansrytmum til meiri jazzkend og funky groove. Tónleikararnir kendu hvønn annan, hoyrdi mann; bólkurin hevur veri› á konsertfer› fyrr í ár í grannlondum okkara. Sí›sti sangurin enda›i vi› skemtiligum samspæli millum Kristian og He›in.

Tónleikurin frá Økusól var fyri ta› mesta ljó›myndir, sum vóru bygdar á ymsar útsetingar av eldri løgum. Vakrar og fri›arsælar ljó›myndir, har tvørfloyta, bass og guitar spæl var lagt afturat. Hjalti Joensen spældi elguitar, Arni Carlsen og Óli Poulsen sótu vi› hvør sínum ljómbor›i, Agnar Lamhauge, bass og kona hansara Marita av Steinum spældi tvørfloytu. Bólkurin er komin saman fyri at vera vi› á einum tónleikafestivali í bygdini Ummanakk í Grønlandi, sum er vinarb‡ur Runavíkar Kommunu.



Trummusláarin Malik

Sí›an stó› Hanus G. Johansen klárur, vi› guitar. Hansara so sera náturliga og fólkaliga upptra›kan, undirhelt hvørjum tí einasta ásko›ara. Hann hevur roynt ta› fyrr, avgjørt, at spæla fyri fólki og á sín egna hátt. Merkingin »Fólka-tónleikari« passar heilt væl her. Um hári› ella anna› skuldi komi í vegin, so er hann ikki bangin fyri at ste›ga á og rætta problemi›; sjálvt um ta› skuldi ver›i í einum so stórslignum sangi sum »Úr Rubaijat«. Hesin sangurin er upprunaliga skriva›ur av Omar Khajjam, ein stjørnu- og støddfrø›ingur, sum livdi um somu tí› sum Tróndur í Gøtu. Hanus helt skemtiliga fyri, »...hetta lagi› gekk Tróndur í Gøtu og murra›i.« Sangirnir vóru av n‡ggju fløguni »Bukett«. Veldugt var at hoyra sangin »Lívi›«. »Bukett« var› eisini spældur. Hanus enda›i vi› at syngja, uttan guittarin, »kvøld«; ein yrking eftir Pól F. Joensen.

Næsti bólkurin sum spældi, hoyrir mann ov líti› til ella ein hev›i í hvussu so er vilja hoyrt meir til hendan bólk. Enekk spældi n‡tt tónleikatilfar, sum er nokk so torført at bólka í nakra ávísa tónleikagrein. Kanska mangla›i intensitetur, ella skuldi framførslan ver›i longri, løgini vóru merkt av mystikki. Høgni Klakkstein vísti, m.a. eini í trummusolo, á hvørjum høgum stø›i hann er. Ma›urin hevur veri› yviri í statunum í læru hjá teimum heilt størstu ásláarunum í heiminum. Enekk man ver›a tann mest spennandi bólkurin sum er her heima og aftaná tær tríggjar fløgurnar, bólkurin hevur givi› út, hevur Enekk nógv eftir at geva. Vit vóna so ta› besta.

Sum vanligt á Fólkatónleikarastevnuni eru útlendskir gestir vi›. Í Gøtu spældi trummusláarin Malick Jagne, sum er uppvaksin í Gambia og er nú búsitandi í Danmark. Afturat sær hev›i hann Gøtumenn, teir flestu úr bólkinum Clickhaze, sum hann fyrr hevur spælt saman vi›. Malick spælir upp á vestafrikanskar trummur og var ta› sera undirhaldandi at síggja. Ásko›ararnir vóru heilt vi› uppá tær afrikansku rytmurnar, og dúgliga var klappa fyri Malick og hansara monnum.

Ein sera gó› byrjan til eitt megnar tiltak.

Hanus Johansen hev›i eina framúr gó›a framførslu

gult cyan magenta svart

Frítt er úti á Eggjum

Gongutúrurin av Trøllanesi út til vitan Úti á Eggjum er túrur, øll klára. Men gott er at hava sta›kent fólk vi›

EDVARD JOENSEN

Ta› murrar í ve›urhananum, sum melur í vindinum beint yvir okkum. Vit sita úti á eggini vi› vitan nor›ast á Kallsoynni. Vitin ver›ur rikin vi› vindmegi, og ta› eru veingirnir á vindmylnuni, sum ger ravmagni›, i› gera hetta ljó›i›, sum er so hvølt yvir okkum.

Her er høgt til loft og vítt til veggja, hóast veggirnir eru rættiliga høgir stutt frá okkum. Vit síggja inn í bergi vestantil á Borgaranum. Hesum 531 metra høga fjallinum, sum Páll Fangi í síni tí› bey› sær at lesa seg upp fyri, um hann fekk frælsi afturfyri.

Her, vit sita og hyggja inn í bergi› í dag, er ilt at trúgva, at nakar kann hava rokna› vi› at koma livandi frá at lesa seg eftir línu upp fyri her. Men rímiligt hevur ma›urin hildi›, at hann ta› sama kundi brá›doyggja vi› at detta oman her á kendum heimalei›um sum at rotna spakuliga upp í onkrum donskum fongsli.

Ta› er fríggjadagur, og vit eru komin vi› Barsskor úr Klaksvík beint eftir middag. Hendan dagin er fer›aætlanin solei›is, at til ber at sleppa inn aftur seinnaprtin, um ein ikki ætlar at gista í Kalsoynni.

Hjá tí, sum kemur innan av landinum, er ney›ugt fyrst at fara vi› Dúgvuni úr Leirvík. Bí›a› ver›ur so eina løtu í Klaksvík, til Barsskor klokkan knapt eitt fer í Kalsoynna.

Hugnaligt er at standa í st‡rihúsinum á aldursforsetanum í føroyska strandfaraflotanum og práta vi› skiparan, Sørin Danielsen, sum saman vi› Jógvani Joensen, motorpassara er manningin í dag.

Samla›a manningin er tríggir, siga teir. Teir skifta fríggjakvøld, solei›is at altí› ein hevur frí. Í kvøld eigur Sørin frítørn. Og hann gle›ir seg.

Ája, vit koma yvir á Sy›radal, har lagt ver›ur inn í móti lendingini, me›an eitt einstakt fer›afólk fer í land. Sí›an ver›ur siglt nor›ur á Húsar, har restin skal av.

Vi› Bygdalei›um ver›ur so koyrt nor›ur á oynna, har vit hava avtala› vi› Jógvan á Nesi at fylgja okkum út til vitan.

Tá bussurin kemur út úr nor›asta berholinum, stendur ma›ur fyri okkum, og vit fara úr. Ein t‡skur fer›ama›ur er vi› í bussinum, men hann vil heldur fara oman í sjálva bygdina. Vit tríggir, Jógvan og myndama›urin, fara so beinanveg til gongu.

Vit ganga eftir sløttum haga, og ta› ver›ur gingi› eftir sløttum allan vegin heilt út til vitan.

Fyrsta vit eru farnir til gongu, byrjar Jógvan at siga frá. Vit frætta um sta›arnøvn, vit síggja, og um søgu og søgn úr oynni. Hann veit væl og dugir væl at bera fram, so tann forvitni fer›ama›urin fær nógv at vita, sum ikki hev›i komi› vi›, um ikki frálíki fer›alei›arin var vi› okkum.

Rættiliga hvussu gomul bygd Trøllanes er, er helst eingin, sum veit. Søguliga ber til at fara so langt aftur, sum skriva›ar keldur eru til skjals, og tá vóru í hvussu er tvey húsarhald á Nesi, sum teir her nor›uri í oynni nevna bygdina.

Ikki hevur altí› veri› líka lætt at búleikast á plássinum. Líti› er upplandi›, og einki torv solei›is. Nesmenn máttu tí av oynni at fáa torv, og ta› fingu teir á Gó›adali nor›an fyri Fuglafjør›, grei›ir Jógvan frá. Og hann veit at siga, at okkurt er, sum bendir á, at so var, tí á Gó›adali vísa teir á Neshei›ar, sum eina grei›a ábending um, at her var› trøllanestorvi› skori› og røkta›. Jógvan metir, at fuglfir›ingar hava fingi› fugl frá nesmonnum afturfyri.

Vit síggja yvir á Kunoynna, har Hestmúlin er so sjónskur. Og eystan fyri stingur Enniberg seg so hábærsligt fram undan

Mynd: Jens Kristian Vang

Sum vit ganga út gjøgnum dalin legst landi› eystan fyri opi› fyri okkum.

Stórbært er, má sigast. Jógvan grei›ir frá um sta›arnøvn og søgur og hendingar. Vit síggja yvir á Kunoynna, har Hestmúlin er so sjónskur. Og eystan fyri stingur Enniberg seg so hábærsligt fram undan. Júst hendan dagin er ve›ri› ikki ta› allarbesta, og eitt sindur támut er.

Vit ste›ga á og líta aftur um okkum. Har stendur Nestindur so hóttandi reystur beint yvir okkum. 787 metrar beint upp í luftina. Men lættur at koma upp á kortini, sigur Jógvan og grei›ir okkum frá, hvønn veg fari› ver›ur. Og beint nor›an fyri er Borgarin, sum her eystantil er valla›ur líka á toppin.

Vit fylgja sey›arásini nor›ureftir. Og knappliga liggur ein grønur, væl valla›ur dalur fyri okkum. Og er dalurin grønur, er kjálkin nor›an fyri uppaftur grønari.

Hatta er Høvdin, grei›ir Jógvan frá. Stóri Høvdi, ver›ur hann nevndur her. Lítli Høvdi er uttan fyri vitan, sum vit síggja uppi á rø›ini.

Eitt, vit sakna eitt sindur, er fuglur, Hann er ikki tann nógvi her. Onkur einstakur kjógvi og spógvi, er ta› mesta vit hoyra og síggja.

Men komnir ni›an á rø›ina, er aftur fyri fuglur at síggja í berginum vestanfyri.

Nú er turt og klára› er væl upp. Ta› er kortini bara ein gó›ur hálvur tími sí›an, vit fóru úr bussinum. Jógvan sigur, at ta› er ikki skjótt gingi›, um vit ikki hava pjaka› okkum kortini. Men vanliga ver›ur rokna› vi›, at ta› tekur ein hálvan tíma at ganga úr bygdini út á vitan.

Ta› lotar enn eitt sindur ni›an móti rø›ini, so vit fara vestur um og setast eitt sindur oman móti upsini, me›an Jógvan grei›ir frá tí stórslignu sjónini vit her síggja.

Vestur eftir síggja vit inn á Funning. Múlan, Rivtanga, Risan og Kellingina og naka› væl inn á Ei›iskoll. Longri burtur er Tjørnuvíksstakkur so t‡›iligur at síggja, tí har stendur sólin júst nú á, me›an M‡lingur og Skei›i› gerast bakgrund.

Undir okkum er lív. Rita, lomvigi, lundi og havhestur er ta› mesta vit síggja. Beint undir her, vit sita, er Kallsberg, grei›ir Jógvan frá. Og innari er Kallsvík. Vit kika og síggja, at naka› av lomviga er í berginum, men ikki tann nøgd, Jógvan helst vildi kortini.

Aftur fara vit til gongu. Ganga runt vitan og út á høvdan. Vit síggja ni›ur á helluna nor›an fyri, har Kallurin, sum gav oynni navn, hevur sta›i›.

Men Kallurin er ikki til meira. Kallurin var ein drangur, sum fór av brimi einafer› í 20'unum, sigur Jógvan, men hann veit ikki at siga ári›.

Gingi› ver›ur út eftir Høvdanum, oman dalin og beina lei› at húsum, har vit bí›a, til bussurin kemur eftir okkum og koyrir okkum aftur til Húsar, ha›ani vit fara vi› Barsskor til Klaksvíkar.

Mynd: Jens Kristian Vang

Fakta:

Gongutúrur av Trøllanesi út á vitan Úti á Eggjum. Lættur túrur. Umlei› hálvan tíma at ganga á sløttum haga. Havi fer›alei›ara vi›. Ta› loysir seg. Nógv fæst at vita. Ansi› eftir í upsini. Einki hegn er, sum verjir fyri, hvussu langt oman ein kann fara.

Fer›alei›ari:
Jógvan Joensen,
Trøllanes tlf. 45 66 65.
Kostna›ur:
kr,. 20,- fyri hvønn

Jógvan Joensen sigur frá um sta›arnøvn og grei›ir frá ymsum søguligum

Mynd: Jens Kristian Vang

Hvat hendir í Føroyum? www.kunning.fo